# Væleydnað Chopin-kvøld í Pakkhúsinum

**Tað var ein uppliving at hoyra klaverleikaran Klaus Telling í Stóra Pakkhúsið sunnukvøldið, har hann leikti verk eftir klaverúrmælingin Chopin. Hetta er krevjandi tónleikur, ikki minst leikara, men Klaus Telling hevði gjørt sítt heimaarbeiðið og gav eina konsert til toppkarakter**

KLAVERKONSERT
*Dagfinn Olsen*

Klassisk konsert eru heldur rár hending í útjaðaranum. Men við Stóra Pakkhúsið, ið hevur fingið eitt klaver, ið stendur mát við tað, ið krevst til allar konsertir, hava vágbingar fingið karmar til eitt sindur av hvørjum. Og sunnukvøldið var hol veruliga sett á vetrarskránna við eini framúr klaverkonsert, har tónleikur eftir tónaskaldið Chopin var á skránni.



*Chopin-kvøld var sunnukvøldið í Stóra Pakkhúsi í Vági. Klaverleikarin Klaus Telling prógvaði seg sum leikara í serflokki og teir umleið 40 áhoyrararnir fingu eina sanna tónleikauppliving, har slík ferð stundum var yvir splinum, at ilt var at síggja fingrarnar hjá fingrafima klaverleikaranum*

Chopin-kvøldið var skipað við klaverleikaranum Klaus Telling við ljóðførið. Og tey umleið 40 fólkini, ið høvdu leitað sær í Pakkhúsið, fingu eina framúr konsert. Klaus Telling prógvaði, at hann er leikari í serflokki. Allir tangentar komu í nýtslu og slík ferð var stundum yvir spælinum, at ilt var at síggja fingrarnar hjá leikaranum, so skjótt teir ferðaðust eftir teim hvítu og svørtu tangentunum. Flott. Her var bæði skjótt og flott spæl, men eisini tað vakra og inniliga. Jú, her var dygd og ein sonn tónleikauppliving.

## Chopin

Og tað var eisini flottur og krevjandi tónleikur, ið stóð á skránni: Etude í C-moll (Revolutiónsetudan), Preludium í cis-moll, 4 mazurkaðir (Vivace, Lento, Allegro og Andantino), Impromtu í cis-moll og Ballada í G-moll.

Frederic Chopin var føddur í Pólandi í 1810 og doyði longu í 1849, bert 39 ára gamal. Hann livdi tó meginpartin av sínum stutta lívi í Fraklandi. Tað var tónaskaldið Franz Lizt, ið hjálpti honum fram, við at lata hann leika til eina konsert hjá sær. Fólk komu at hoyra Lizt, men ljósið varð sløkt og Chopin leikti sín tónleik og var væl fagnaður. Chopin fekk tuberklar og doyði at enda av sjúkuni.

Tónleikur Chopin er nærum bert fyri klaver, eitt ljóðføri, sum bleiv ment og betrað í hansara tíð. Hann menti ein framúr teknikk og hevði evnir fyri teim møguleikum, ið nýggja ljóðførið hevði. Hansara tónleikur telist millum vakrastu verk og eisini tey best dámdu, men eisini tey kravmiklastu, ið eru skrivað fyri klaver. Og altíð hevur tónleikurin djúpan og sorgblíðan tóna. Longsul, sorg og lagnu.

## Fleiri konsertir

Klaus Telling er dani. Saman við børnunum fluttu hann og konan, Marianne Telling, ið er prestur, fyri góðum ári síðani til Vágs, tá hon fekk prestastarv. Klaus starvast sum urguleikari og tónleikalærari.
Eftir væleydnaðu byrjanina sunnukvøldið liggur væl fyri at halda fram og ætlanir eru um fleiri konsertir.

Klaus Telling sigur, at ætlandi verður ein mánaðarlig konsert. Næstuferð verður lættari jazzur á skránni. Tá verður tað Bill Evans og hansara tónleikur, ið myndar kvøldið. Harumframt hevur Klaus Telling umhugsað at hava konsertir í skúlanum í Trongisvági, har eisini eitt framúr klaver er tókt, men enn eru hesar ætlanir bert ætlanir.




Pumpur til ein og hvønn tørv



sp/f KBI
Postboks 354 - FO-700 Klaksvík
Fartlf. 214406 · Tlf. 458606 - Faks 458706



# Kommunulækni avdottin á vaktini

**Kommunulæknin, sum einsamallur hevði vakt í Suðuroy um vikuskfitið, datt av, meðan hann var til arbeiðis leygarkvøldið. Løgreglan heintaði læknan og fer at ákæra viðkomandi fyri at koyra bil í ávirkaðum tilstandi**

HEILSUMÁL
*Edvard Joensen*

Læknin, sum einsamallur hevði vakt í Suðuroy seinasta vikuskifti, var so ávirkaður av rúsdrekka ella øðrum evnum, at viðkomandi datt av undir eini viðtalu. Løgreglan fer at reisa ákæru móti læknanum fyri at hava koyrt bil í ávirkaðum tilstandi.

Talan er um kommunulækna í sunnara parti av Suðuroy, sum leygardagin varð boðsendur til Hvalbiar at skriva eina deyðsváttan.

Rúm tíð gekk frá tí, kvinnuligi læknin varð boðsend, til hon kom á staðið. Tá læknin so var komin fram, var støðan soleiðis at hon rætt og slætt sovnaði niður við borðinum, áðrenn ørindini vóru avgreidd.

Viðkomandi, sum hevði sent boð eftir læknanum, visti ikki annað at gera enn at senda boð eftir løgregluni at fáa greitt støðuna. Avdotni læknin varð heintaður og koyrdur á politistøðina á Tvøroyri, har brumman bíðaði, greiðir kelda okkara - sum ikki er viðkomandi, ið læknin var hjá - frá.

Løgreglan á Tvøroyri váttar fyri Sosialinum, at hon hevur verið og heintað ein avdotnan persón, sum nú verður ákærdur fyri at hava koyrt bil, ávirkaður av rúsdrekka ella øðrum evnum, sum løgreglumaðurin málber seg.

Læknin ásannar, at hon sovnaði undir viðtaluni, men sigur eisini, at tá hon hjá løgregluni blásti í ballónina, vísti promillan nú. Blóðroynd varð eisini tikin, men tað er vanlig mannagongd, sigur hon.

Hon sigur seg hava verið troytta av langari vakt, og ikki hava drukkið rúsdrekka.

Um hon hevði tikið onnur evni móti møði, vildi hon ikki gera viðmerking til.

– Eg var ikki ávirkað av spiritus og kendi meg ikki so móða, at eg helt nakran vanda vera fyri at sovna, tá eg fór í bilin. Men tað er rætt, at eg sovnaði, tá eg kom inn í hitan, har viðtalan var, sigur læknin.

## Einki eindømi

Fleiri keldur í Suðuroy, sum Sosialurin hevur tosað við, siga óheftar av hvørji aðrari, at tað er ikki eindømi, at viðkomandi lækni hevur verið óálítandi í síni embætisførslu.

Fólk greiða eitt nú frá dømum um, har tey hava havt avtalu við læknan, men tá tey eru komin til viðtalu, hevur hurðin verið stongd, telefonin hevur ikki svarað, og eingin ávísing til annan lækna hevur heldur verið at fingið.

– Tað er greitt, sigur ein kelda okkara, at vit kenna okkum ikki trygg undir slíkum umstøðum. Øll oyggin tosar um hesa hendingina um vikuskfitið, og almenna hugsanin er, at nú er nóg mikið. Slíkt kann ikki bara tigast burtur.

Keldan, sum Sosialurin kennir og hevur álit á, vísir á, at var talan um eina vanlukku ella álvarsligan sjúkratilburð, kundi mannalív verið í vága, tá støðan er soleiðis hjá vakthavandi lækna.

– Slíkt er so stórt ábyrgdarloysi, sigur kelda okkara, at tað eigur at fáa álvarsliga fylgjur fyri avvarðandi lækna.

## Eingin kennir málið

Eingin av avvarðandi myndugleikum, sum Sosialurin hevur verið í samband við, áðrenn blaðið fór til prentingar, vil gera viðmerking til tað konkreta málið.

Í fyrsta umfari er tað ikki vanligt at gera so, verður sagt, og í øðrum lagi siga allir partar, at teir hava ikki hoyrt um málið og tí ikki kenna til tað, fyrr enn teir frætta um tað frá Sosialinum.

Høgni Debes Joensen, landslækni, sigur, at hann vil ikki ger nakra viðmerking aðra enn, at hann ikki longur er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknunum.

Landslæknin er tó eftirlitshavandi myndugleiki, men hann vísir málinum frá sær, tí hann kennir ikki ta konkretu støðuna, sigur hann og vísir til Trivnaðarmálaráðið, sum er setanarmyndugleiki hjá føroysku kommunulæknunum.

Í Trivnaðarmálaráðnum er støðan tann sama, at eingin kennir tað konkreta málið.

Starvsfólkaleiðarin á lønardeildini er í summarfrí, men viðkomandi, vit tosaðu við, sigur, at slíkt mál uttan iva eigur at fáa álvarsligar avleiðingar fyri ein lækna, sum kemur soleiðis fyri.

Sagt verður úr Trivnaðarmálaráðnum, at eitt slíkt mál heilt givið fer hægri upp í »hierakinum« enn á lønardeildina. Tað hoyrir heima á leiðslustigi.

## Felagið skal hoyrast

Heldur ikki formaðurin í Kommunulæknafelagnum vil siga nakað um málið. Tó vísir hann til mannagongdina, sum sambært avtalu millum læknarnar og Trivnaðarmálaráðið eigur at verða fylgd, um sak verður burturúr.

Læknaformaðurin sigur, at tað eru tveir hættir, málið kann enda hjá Kommunulæknafelagnum uppá. Annaðhvørt at limurin, í hesum førinum kommunulæknin, sum málið snýr seg um, vendir sær til felagið og biður um hjálp, ella at setanarmyndugleikin vendir sær til felagið.

Í avtaluni við Trivnaðarmálaráðið stendur, at landsstýrismaðurin, sum í hesum førinum er landsstýrismaðurin við heilsumálum, setir ella loysir kommunulæknar úr starvi.

Landsstýrismaðurin kann loysa kommunulækna úr starvi uttan eftir egnari umbøn. Men tá skal hann við haldgóðari grundgeving fyrst hava sent kommunulæknafelagnum málið til hoyringar.

Bæði Kommunulæknafelgið og viðkomandi lækni hava síðan eina ávísa hoyringarfreist, áðrenn málið verður sent landsstýrismanninum aftur til endaliga støðutakan.


*Leygardagin varð kommunulæknin í Vági, sum einsamøll hevði læknavakt í Suðuroy, boðsend til Hvalbiar at skriva eina deyðsváttan. Long tíð gekk, áðrenn læknin kom, og tá var hon so ávirkað, at hon datt av, meðan hon skrivaði váttanina. Løgreglan fer at reisa ákæru móti læknanum fyri at hava koyrt bil í ávirkaðum tilstandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum sýndu hjálpsemi og samkenslu,
tá ið kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi, langabbi
og oldurabbi okkara

**Martin Eysturdal**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Niels Paula Danielsen
fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til heimahjálparar og sjúkrasystrar
fyri góða hjálp.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur,
og tøkk til tykkum, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sigrid**

## Tøkk

Vit vilja á hendan hátt so hjartaliga takka øllum
tykkum mongu, ið sýndu samkenslu í stóru
sorg okkara tá lítli sonur og beiggi okkara

**Jógvan Ryggshamar**

á ein so óskiljandi hátt varð tikin frá okkum.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu og vóru um okkum
í samband við jarðarferðina.

Til tykkum, sum stuðlaðu okkum ta tíðina vit vóru
niðri og til tykkum mongu, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjunna*
**Mamma og pápi, Rógvi, Esther og Palma**